# Havnardalur – ein leikalund

ALBERT ISFELD
arkitektur, Listi E



Stóri dalurin kring Sandá eigur at verða gagnnýttur til frítíðarvirksemi hjá havnafólki.

Til eitt kommunuval verður sjálvandi altíð tosað nógv, um hvønn bata býirnir og bygdirnar hava tørv á, t.d. skúlar, barnagarðar, eldrabýli, handilsmøguleikar, kor/trivnaður og menning hjá listini, vegir og samferðsla o.s.fr. Hetta er eisini tað, sum hevur størst týdning. Men í eini tíð, har fólk gerast alt meira urbaniserað (býarlig), vanliga vegna lestur uttanlands, er eisini tørvur á fleiri grønum økjum, av tí at býarfólk ganga ikki so nógv úti í okkara vøkru náttúru. Flestu føroyingar fara bert út í hagan og niðan í fjøllini í samband við seyðahald, haruskjóting o.t. - altso um ein hevur eitt hvørt "ørindi" í haganum. Øll fólk hava tørv á at fáa litirnar og angan frá náttúruni inn gjøgnum sansirnar - ikki bert við at standa í býnum/bygdini og hyggja at haganum og fjøllunum - tað eru bara ikki øll, sum vita av hesum, men tað er sera gagnligt fyri sál og sinn - og sostatt trivnað.

Vit hava Viðalundina í Havn og grøna økið millum Ringvegin og Vegin langa, har Svartifossur m.a. er. Hetta seinna økið er er hugnaligt at ganga í ein góðveðursdag.

Tá vit tosa um grøn øki, hugsa vit vanliga um øki í býnum, løtt og skjót at koma til, men í øðrum londum er heilt vanligt, at fólk seta seg í bilin og koyra til okkurt vakurt og grønt stað, og seta seg har at grilla ella eta matpakka, spæla við børnini og hugna sær. Henda møguleika skulu vit eisini hava. Áðurnevnda økið við Svartafoss er væl egna til hesa parkverkætlan.

Eitt annað sera væl egna stað, sum er órørt, er Havnardalur. Hví skal hesin vakri dalur, við trúgvu Sandá og hennara smílandi sílum, liggja so einsamallur uttan fyri Havnina? Vit skulu fara í gongd við at fríðka og fjálga um okkara vakra dal, sum eigur at vera til fragd og gleði fyri allar føroyingar og serstakliga fyri borgarar í Suðurstreymi. Eg hugsi burturav um ovara part av Havnardali - frá Velbastaðarvegnum, ið fer yvir um Sandá, og niðan til og við byrgingina. Runnar skulu plantast við umleið 5-10 meturs fjarðstøðu til ánna og síðan trø aftan fyri runnarnar. Har sum serliga stuttlig ella vøkur náttúra er frammanundan, t.d. við teim stóru klettasavningunum, skal bara vera fríøki (óplanta) - onkunstaðni tó við plássi til grill og sitiplássum t.d. benkir. Blómuteigar skulu eisini gerast, har tað sær rætt út og riggar væl. Tað skal gerast framkomandi við rásum, ið kunnu minna um tær í Viðalundini í Havn - stuttligar, kringlutar og hugnaligar. Onkrar vakrar og sjarmerandi brýr skulu gerast yvir um Sandá í hesi park, fyri at hon eisini verður skilagóð og vælvirkandi at ganga í.

Hetta verður sjálvsagt ikki ein verkætlan, sum verður liðug undir komandi býráð; tað tekur jú nógv ár hjá trøum at vaksa og trívast, men eg fari at gera mítt til, at komandi býráð setur gongd á hesa ætlan, sum allir føroyingar um eini 20-30 ár fáa høvi at njóta í fullum blóma. Hetta øki er sera stórt og er tí eisini møguleiki fyri at gera eitt vala tjaldingarpláss, og sjálvsagt skal hesin møguleiki nýtast til fulnar. Ein slík verkætlan - parkin í Havnardali - fer sostatt ikki bert at gleða havnarfólk og aðrar føroyingar, men fer at vera ein serstøk náttúrupark fyri ferðafólk, og fer soleiðis óivað at vera við til at menna ferðavinnuna, sum verður til gagns fyri allar Føroyar, men sjálvandi verður parkin í Havnardali mest til gagns fyri borgarar í Suðurstreymi - og Havnina burturav.

# Góði veljari

UNN HENTZE
valevni Miðfloksins til kommunuvalið 2008



Í morgin er so dagurin, tá veljast skal.

Eg stilli upp til býráðsvalið, tí eg meini eg kann gera mun.

Heilt stutt um meg privat: Eg eri 39 ára gomul og havi tvey børn. Lesi Stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetri Føroya, og havi skrivstovuútbúgving, ið eg tók á Tórshavnar Býráð.

Í seinastu bløðum, havi eg skrivað um nakað av tí, eg haldi hava týdning fyri eitt komandi býráð, at takað í. Fyri aftur at minna teg á hvat eg standi fyri, góði veljari, so komi eg her við nøkrum dømum:

SKÚLIN: Játtanin til skúlarnir má ikki minka. Børnini skulu hava frukt, grønt (her hugsið eg ikki um grønar keks) og mjólk í skúlanum. Eftirlit skal verða við byggningunum.

FRÍTÍÐARSKÚLIN: Børnini skulu kunna koma í frítíðarskúlan, í hvussu er, til og við 3. flokk. Eftirlit og dagføring skal gerast av hølum/byggningum.

TILBOÐ TIL UNG: Nógvur peningur hevur seinastu árini verið brúktir uppá ítróttin, nú er tíðin komin til "hini". Peningur skal enn brúkast uppá ítróttin, men peningurin skal býtast meira javnt millum tilboð til ungdómin. Vit hava hoyrt at tað er sera langur bíðilisti til musikkskúlan og at hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Hettar er alt ímeðan við hava bygt hallir og rennibreyt, alt gott um tað, men, sum sagt, so má umdeilingin gerast javnari.

MIÐBÝURIN: Meira lív í miðbýin. Ljóðar sum ein kliche, eg veit, men okkurt skal gerast. Vit hava ein sera hugnaligan, men deyðan, miðbý. Aftána klokkan 17.00 er einki lív, uttan barrir og bilar. Sølustøð ella matstovur eiga at verða á niðastu hædd í øllum byggningum í gonguøtini.

PARKERING: Eg vil arbeiða fyri at ein parkeringskjallari verður gjørdur í miðbýnum. Hesin skal tó, fella so val inn í býarmyndina, sum gjørligt er.

ELDRAØKI: Fleiri sambýli gerast og eftirlit og dagføring av verðandi eldrabústøðum.

BÚSTAÐARVIÐURSKIFTI: Vit skulu hava eina leigulóg, ið virkar. Og vit skulu hava grundstykkja prísin niður. Eisini skulu vit hava skúlaheim, at bjóðað lesandi og lærlingum.

Við hesum vil eg vísa tær, hvat eru míni hjartamál og heita á teg um, at fara á val og seta X við nøg tann 11.11.08.

Vinaliga og takk fyri.

# Borgarin í Tórshavnar kommunu í miðdeplinum

KITTY MAY ELLEFSEN
Forkvinna í Havnar Framburðsfelag



**Trivnaðurin hjá borgaranum eigur at verða snúningsásin í øllum politiskum átøkum**

**Vælferðarráð**
Eitt vælferðarráð eigur at setast á stovn, ið hevur eitt vakið eyga við førda vælferðarpolitikkinum í Tórshavnar kommunu. Harumframt eigur at setast á stovn eitt barna og ungdómsráð, ið skal tryggja børnum og ungum bestu kor og umstøður at vaksa upp og mennast.

**Útbúgving**
Fyri at seta borgaran í miðdepilin hevur tað stóran týdning at hesin hevur møguleika at menna egin evni. Tey ungu skulu ikki av landinum at nema sær útbúgving. Tvørturímóti skal Havnin gerast til universitetsbý har ungdómur uttan aðrastaðni kemur at nema sær útbúgving.

**Tórshavn altjóða mentanar og vinnudepil**
Føroyar skulu verða fyrimynd í altjóða samfelagnum. Her skal blóma við mentan, list og nýskapan. Vælvirkandi skipanir eiga at borga fyri, at íverksetara spyrarnir festa røtur soleiðis, at hetta tilfeingið kann gerast ein týðandi partaur av samfelagsbúskapinum.

Tá føroyska samfelagið enn ikki hevur megnað hesa uppgávuna skal Tórshavnar Kommuna ganga á odda fyri at skapa karmar um ein Føroyskan mentanar og vinnudepil.

**Umhvørvi**
Tórshavnar kommuna skal hava umdømi sum ein ábyrgdarfull kommuna har umhvørvi verður sett í hásæti. Bæði borgarir og vinnan skulu taka umhvørvi við í sínar ætlanir og øll dálkandi virki skulu hava eina umhvørvisskipan

**Fíggjarligt skynsemi**
Tíðin er komin at umhugsa og raðfesta komandi íløgur so kommunan ikki endar í fíggjarligum óskili.

Við borgaranum í Tórshavnar kommunu í miðdeplinum fer kommunan at mennast og fólkið at trívast.

# Takki fyri meg!

TÓRUR JOHANNESSEN
varaborgarstjóri

Gjørdi upp við meg sjálvan, beint eftir síðsta kommunuval, at hettar varð mín seinasta seta í kommunustýrinum á Sandi. 12 ógloymilig ár. 12 ár við óbegrípiliga spennandi avbjóðingum, men eisini við keðiligum løtum. Tær góðu vinna tó altíð í minninum. Serliga glaður havi eg verið fyri samstarvið við tey, sum stilla upp á Lista C til kommunuvalið týsdagin 11. nov. Vit hava goldið nærum helvtina av risaskuldini hjá Sands Kommunu, sum harumframt varð sanerað við u.l. 13 mió.kr seinast í nítiárunum. Eitt megnartak, sum eg ikki trúði varð gjørligt fyri 12 árum síðani, tá skuldin var áleið 53-54 mió.kr.

Serliga hugaligt hevur verið seinnu árini, har tað hevur borið til at gjørt góðar íløgur fyri sandingar og fólkið í oynni. Listasavnið og Bókasavnið eru veruleiki takkað verið ótrúliga góðum gávum frá Sandsvinum. At vit sjálvi hava kunnað lagt pening til síðis, til ein ógvuliga væleydnaðan nýggjan barnaskúla, er stuttligt at síggja. Og eg gleðist saman við bygdafólkinum, og kenni meg ikki sørt ernan av okkara avrikum. Sløkkiliðsbilurin var eitt hjartamál hjá mær, og eisini tað megnaðu vit. Nú er grundøkið til sløkkiliðsstøðina komið undir land, og vónandi verður hon veruleiki í komandi valskeiði.

Bygdin og kommunan er komin aftur á rættkjøl, hóast eg veit at okkurt nosið kann vera fyri framman. Somikið kann lívið bjóða okkum.

Haldi at kósin sum listi C. hevur sett er tann rætta, og eg haldi at samstarvið millum tey sum ynskja samstarv hevur verið fyrimyndarligt. Ætli mær ikki at leggja eftir nøkrum, nú eg farið gjøgnum dyrnar, tí eg havi eitt gott forhold til øll tey sum eg havi samstarva við.

At enda vil eg takka øllum mínum stuðlum og øllum teimum sum hava stuðlað lista C. og vóni at tey framhaldandi fara at stuðla lista C., tí tað geri eg.